# Havnarbáturin var drúgvastur í framúr kapping




*Í harðari kapping við Klaksvíking og Vestmenning, vann Havnarbáturin sín fyrsta sigur í ár*
Mynd Jens Kristian Vang

**Neyvan nakrantíð áður hevur kappingin millum 10–manna-førini verið so breið í oddinum, sum hon var í Sundalagnum**

10–MANNAFØR
*Jóannes Hansen*

Tað er nevyan komið fyri áður, at kappingin um at vinna 10–mannafars róðurin hevur verið so tøtt, sum hon var í fjør í Hósvík. Ikki tað at munurin millum fremsta og næstfremsta bátin ikki hevur verið minni enn eitt sekund áður. Men heldur tí at tað á øllum 2000 metra teininum vóru fýra bátar, sum bjóðaðu av í kappingini um fremsta plássið, og sum skiftust um at vera fremstir.

Í endaspurtinum var Havnarbáturin drúgvastur, og harvið vann báturin, sum í fjør var fremstur í øllum seks kappingunum, fyrstu ferð í ár. Eysturoyingurin, sum vann bæði í Klaksvík og á Skálafjørðinum endaði á fjórða plássinum. Men hóast hann misti týdningarmikil stig í FM kappingini, so var munurin fram til fremsta plássið ikki stórur. Frá Havnarbátinum og til Eysturoyingin var minni enn ein hálv bátslongd! Tað vil við øðrum orðum siga, at tað á ongan hátt ber til at avskriva Eysturoyingin.

Við allari virðing fyri kappingarneytunum hjá Eysturoyinginum, so mundi ein av orsøkunum til, at tað hesa ferð ikki royndist so væl vera, at ein av manningini umborð á Eysturoyingi alla vikuna undan Sundalagsstevnuni hevði ligið sjúkur. Tað var ivasamt, um hann fór at verða førur fyri at rógva, men hann var við. Sjálvandi var førleikin ikki tann, sum hann hevði verið í hinum báðum kappingunum.

**Nógvur taktikkur**

Tá Eysturoyingurin í 1998 og í 1999 var so óførur at vinna allar róðrarnar, vóru sigrarnir ofta sera sannførandi soleiðis at skilja, at hann var fleiri bátslongdir undan hinum bátunum, sum kappaðust um næstu plássini.

Í fyrraárið var Vestmenningurin FM vinnari, og í fjør vann Havnarbáturin allar róðrarnar. Kappingin higartil í ár hevur verið púra øðrvísi, enn hon var í fjør. Frá fyrsta startskotinum og inntil síðsta takið í endaspurtinum hevur munurin verið so mikið lítil, at tað alla tíðina hevur verið møguleiki fyri, at sigurin kann gleppa oddafiskinum av hondum. Soleiðis var tað eisini í Hósvík.

Nólsoyingurin datt beinanvegin afturav, og á málinum var hann nógvar bátslongdir aftanfyri hinar fýra bátarnar. Nólsoyingar tykjast í ár hava ilt við at standa seg í hørðu kappingini – í hvussu so er á tvey túsund metrum – og tað er alla æru vert, at teir royna at hanga í.

Ofta hava vestmenningar roynst illa á fyrsta teininum. Soleiðis hevur tað ikki verið í ár, og soleiðis var tað heldur ikki í Hósvík. Vestmenningurin reyk avstað, og hann var leingi fremstur. Men í sjálvum endaspurtinum roynstist hann ikki so dyggur sum Havnarbáturin.

–Tað sær ógvuliga taktiskt út, og tá vit rógva 2000 metrar er nógvur taktikkur uppií. Allir bátarnir lúra eftir hvørjum øðrum. Allir royna onkra ferðina at slíta seg leysar av hinum og harvið at koma sær eitt sindur framum og tískil at fáa møguleikan at stýra kappingini, men hinir eru sera skjótir at svara aftur og at køva sovorðin upplop.

Hetta eru Magni Brøðraberg, bátsformaðurin umborð á Havnarbátinum, og Martin Venned, sum rør við Klaksvíkinginum og sum er róðrarvenjari í Klaksvík, samdir í.

Spurningurin er so, hvør eigur mest eftir í spurtinum, og tá var tað hesa ferð so mikið javnt, at tað næstan var ein spurningur um, hvør átti síðsta takið.

**Lærmenninir seta ferðina**

Sjálvandi var sigurin hjá FM vinnarunum søtur. Tað hevur alla tíðina verið roknað við Havnarbátinum, men teir hava havt ilt við at vinna sær støðuna, sum teir áttu í fjør.

– Sammett við í fjør hava vit skift fimm menn út. Tað gjørdu vit eisini undan kappingini í fjør, men tá tóktist tað ikki bila. Ein av frágreiðingunum uppá, at tað hevur verið torførari at vinna í ár, enn tað var í fjør er stutt sagt, at manningarnar eru javnari, enn tær vóru í fjør. Men vit hava eisini havt torførari við at finna rætta áralagið í ár, enn vit høvdu í fjør. Tað hevur havt stóran týdning, at vit hava skift báðar lærmenninar síðani í fjør. Teir hava sera stóran týdning, tá ferðin ella tempoið skal setast.

Hetta sigur Magni Brøðraberg. Hann hevur róð síðani 1994, og hann hevur verið umborð á Havnarbátinum síðani í 2000. Hini árini hevur hann sitið í rúminum, men í ár er hann saman við makkaranum, sum hann í fjør hevði í rúminum, fluttur aftur á lærbekk ella aftur har, sum ferðin so at siga verður avgjørd.

*Vóru tit greiðir yvir, at tit høvdu vunnið?*

Vit lógu norðast í feltinum. Tí sóu vit bara Klaksvíkingin. Hann var onkra løtuna frammanfyri okkum, og so var hann aftanfyri viðhvørt. Men vit høvdu kensluna av, at tað var so javnt, at tað var næstan ein spurningur um, hvør skuldi taka síðsta takið. Stýrimaðurin hjá okkum hevði leingi Vestmenningin fremstan. Tað tóktist sum um, at hann misti eitt sindur, áðrenn vit komu til endaspurtin, men so vann hann so mikið nógv aftur á seinastu metrunum, at tað var ein spurningur, um vit ella vestmenningar vóru fremstir. Tað var sera spennandi, heldur bátsformaðurin umborð á Havnarbátinum.

**Scilly órógvar**

Havnarbáturin vann FM heitið rudduliga í fjør. Ti stóð tað teimum í boði at fara suður á Scilly oyggjarnar í mai, og hetta var ein avbjóðing, sum teir gleðiliga tóku av.

– Tað verður ofta tosað um, um Scilly kappingin er góð ella ikki góð fyri FM kappingina. Vit eru í hvussu so er ikki betri fyri at kappast um FM, enn vit høvdu verið, um vit ikki høvdu havt verið á Scilly oyggjunum.

*Hví?*

– Róðrarlagið er heilt øðrvísi. Í Scilly kappingini rógva vit sera seigliga. Vit hava arbeitt nógv við at fáa ferðina upp aftur. Tað hevur gingið striltið, men nú haldi eg, at tað hevur eydnast hjá okkum, sigur Magni Brøðraberg.

Teir umborð á Havnarbátinum fóru undir fyrstu venjingarnar í januar. Í apríl vóru teir nakrar ferðir í Havnarbátinum, áðrenn teir fóru av landinum.

– Vit vandu næstan í tveimum bólkum – teir sum fóru til Scilly oyggjarnar og so hinir. Tað var neyðugt hjá okkum at rógva í Havnarbátinum, áðrenn vit fóru avstað. Tað gjørdu vit fyri at styrkja um samanhaldið. Men tað var ikki fyrrenn vit komu aftur til Føroya, at vit rættuliga fóru at venja við Havnarbátinum.

*Vænta tit at endurvinna FM heitið?*

– Vit fara at gera okkara besta í kappingunum, sum eru eftir. Hvussu langt tað fer at røkka, fáa vit at síggja. Men tað er so mikið javnt, at tað so at siga er dagsformurin, sum ger av, hvør er fremstur, og hvør verður nummar fýra, heldur Magni Brøðraberg.



# Kvívíkingurin hevði leingi tak á



*Kvívíkingur dróg longra stráðið á sundalagstevnuni, og hevur lagt seg á odda í samlaðu støðuni*
Mynd Jens Kristian Vang

**Men á málinum var fjarstøðan aftur til Argjabátin so lítil, sum tað ber henni til at vera**

8–MANNAFØR
*Jóannes Hansen*

Kvívíkingar og argjamenn eru teir einastu, sum kappast um fremsta plássið og harvið sigrarnar. Higartil hevur tað verið sera javnt. Argjabáturin vann í Klaksvík, Kvívíkingurin vann í Runavík, og aftur í Sundalagnum var Kvívíkingurin fremstur. Men munurin aftur til Argjabátin var næstan so lítil, sum tað ber honum til at vera. Argjabáturin var bara 2/25 av einum sekundi aftanfyri Kvívíkingin. Tað ber næstan ikki til at vera meiri spennandi, enn tað var.

Kvívíkingurin legði sera bragdliga fyri. Hann stakk seg beinanvegin eitt sindur framum Argjabátin, sum tóktist missa eitt vet í fyrstu tøkunum. Men tað var skjótt, at munurin minkaði niður í lítið og einki. Á túsund metra málinum var Kvívíkingurin kanska eina hálva bátslongd frammanfyri Argjabátin, men so svaraði Argjabáturin aftur, onkra løtuna minkaði munurin niður í ein skut, so øktist aftur, men alla tíðina tóktist tað sum um tað var Kvívíkingurin, sum so at siga hevði tak á kappingini.

Í endaspurtinum gjørdi Argjabáturin ein orduligan vørr, men tað eydnaðist teimum akkurát ikki at taka Kvívíkingin. Men kappingin í Hósvík leggur upp til ein spennandi róður í Vági.

Tað er synd at siga, at talan er um breiða kapping millum 8–mannaførini. Knørrur royndi fyrstu løtuna at fylgja við, men tað var skjótt, at hann dragnaði, og á málinum var munurin fram til Argjabátin út ímóti tveimum bátslongdum.

Húsavíkingurin blandaði seg ongantíð uppí, og Ørvur, sum luttók fyri fyrstu ferð í ár, var aftastur. Tann báturin er ikki mannaður fyrrenn fyri stuttum.

Í dag fær Havnar Róðrarfelag ein nýggjan Ørv. Tað er Sámal Hansen, sum hevur smíðað. Tað verður kortini ikki við nýggja, men við gamla Ørvi, at Havnar Róðrarfelag fer á jóansøku. Nú skal nýggi báturin smyrjast, pussast, snákast og annars gerast til. Kanska verður hann klárur til vestanstevnuna, og hann verður í hvussu so er við í kappróðrinum á ólavsøku.

At gamli Ørvur var við í Hósvík og aftur verður við í Vági er fyri at tryggja nýggja bátinum rættin at taka lut í ólavsøkuróðrinum.

Gamla Kvívíkingin ella Kvívíksbátin, sum hann nú verður nevndur, og Nevið Reyða, sum teir í Kappróðrarfelagnum NSÍ mannaðu næstsíðsta vikuskifti, sást einki til í Hósvík.

# Smyril legði upp til spennandi jóansøku

**Men munurin aftur til teir báðar næstu bátarnar var ikki størri enn so, at tað framvegis er møguleiki fyri stórari kapping í Vági**

6–MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*

Smyril endurtók í Hósvík bragdið, sum hann framdi á Skálafjørðinum. Harvið er lagt upp til ein sera spennandi róður, tá 6–mannaførini við monnum komandi leygardag fara at kappast á Vágsfirði. Tað hevði verið ein fín reklama fyri kappróðurin í Suðuroy, um tað hevði eydnast Smyrli at vunnið í heimasjógvi, og møguleikarnir tykjast vera góðir.

Smyril fekk ikki besta startin í Hósvík. Hann átti Páll Fangi, sum vann í Klaksvík. Páll Fangi hevði hug at draga frá hinum bátunum, og tá startspurtin var gott og væl av, var munurin aftur til Hvessing, Smyril og Strálana ein hálv bátslongd.

Men á 1000 metra málinum var púra javnt millum Páll Fanga og Smyril, og á næstu meiri enn fimm hundrað metrunum vóru bátarnir meiri ella minni stavn um stavn. Onkra ferðina var Páll Fangi ein hálvan skut frammanfyri Smyril, og onkra ferðina hevði Smyril hug at stinga stavnin framum bátin úr Klaksvík.




*Smyril gjørdist drúgvastur hjá 6 mannaførum á sundalagstevnuni, og lagt er upp til spennandi róður á Jóansøku*
Mynd Jens Kristian Vang

Í sjálvum endaspurtinum var Smyril drúgvastur, og so var tað merkisvert, at Gongurólvur í endaspurtinum hevði hug at bjóða Páll Fanga av í kappingini um annað plássið. Á málinum var Smyril eina hálva bátslongd frammanfyri Páll Fanga, og Páll Fangi var eitt sindur styttri enn tað frammanfyri Gongurólv.

Tað hevur verið roknað við, at nýggi báturin hjá Havnar Róðrarfelag skuldi gera um seg í ár, men í tveimum teimum fyrstu kappingunum gørdi Gongurólvur einki við Páll Fanga og Smyril. Hesa ferð megnaði Gongurólvur heldur ikki at vinna seg longri fram enn á triðja plássið, men teir vóru tættari við, enn teir hava verið hinar ferðirnar.

FM vinnarin frá í fjør og í fyrraárið, Strálan, tykist ikki hava nakran møguleika í ár. Hvessingur, sum vann FM í 1999, hevði onkra løtuna hug til at vera framvið, men í síðstu kappingini var hann ikki nóg drúgvur. Kappingin hjá Hvessingi í FM tykist skula vera við Gongurólv um bronsukrónurnar – um Gongurólvur ikki fer at gera okkurt heilt álvarsamt við Smyril og Páll Fanga í teimum trimum kappingunum, sum framvegis eru eftir í hesum árinum.

# Jarnbardur heldur ikki tikin í Hósvík

**Men Riddarin kom hesa ferð nærri vinnarabátinum, enn nakar hevur verið Jarnbardi fyrr í ár**

6–MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Jarnbardur tykist stevna trygt fram ímóti FM heitinum. Í fjør fóru gullkrónurnar norður til Klaksvíkar. Jarnbardur vann tær í 2000 og í 1999, og alt bendir á, at kvinnurnar í róðrarfelagnum Knørri aftur í ár fara at vinna gull.

Í Hósvík vunnu tær fyri triðju ferð í ár – av trimum møguligum sigrum. Jarnbardur varð beinanvegin fremstur, og fyri tað mesta snúði kappingin seg um, hvør skuldi vera næstfremstur.

Men á síðsta teininum vóru tær umborð á Riddaranum úr Miðvági sera drúgvar. Á málinum var munurin frá Jarnbardi og til Riddaran minni enn ein hálv bátslongd. Og munurin ímillum teir báðar fremstu bátarnar var væl minni, enn hann var frá Riddaranum og aftur til meistarabátin frá í fjør, Páll Fanga, sum var eina bátslongd aftanfyri Riddaran.

Spurningurin er so, um Riddarin fer at megna at gera nakað við Jarnbard í Vági ella kanska, tá næstsíðsta FM kappingin seinni í summar verður í Miðvági.

Men higartil hevur eingin megnað at gjørt nakað við Jarnbard. At vinnarabáturin hesa ferð fekk ein kvøkk á síðsta teininum fer ivaleyst at hava við sær, at tær næstu ferð fara at leggja uppaftur meiri fyri, og so skulu tær umborð á Riddaranum veruliga vísa, hvør dugur er í teimum.

Páll Fangi tykist ikki hava somu ferðina, sum hann hevði í fjør. Tað hevur verið tosað um, at Scilly ferðin hevur havt við sær, at tað so at siga er komið ólag í áralagið. Sammett við í fjør verður róð nógv meiri seigan róður. Hetta siga tær í Klaksvík seg vera greiðar yvir, og undir venjing stríðast tær fyri at koma á rætta lagið aftur. Men higartil hevur tað ikki hjálpt so mikið nógv, at tær hava vunnið seg inn á Jarnbard, og tvær tær seinastu ferðirnar hava tað verið tær umborð á Riddaranum, sum gott og væl hava vunnið annað plássið.

Hvussu tað fer at laga seg seinna helmingin av kappingarárinum fæst fyrsta ábendingin um komandi leygardag, men tað skal framvegis nógv til, áðrenn Jarnbardur verður koppaður av trúnuni, sum hann tykist hava sett seg so trygt í.




*Onki røkist fyri, at Jarnbardur verður tikin í ár*
Mynd: Jens Kristian Vang